# knast av nýggjum



*Vegskeltið til Fámjin stendur skrivað við a, altso Famjin. Upprunin til navnið er óvissur, men semja er um at Fámjin er tann eldri formurin, meðan Famjien er ein yngri úttala eftir tí danska skriftforminum Famien. - Navnið eigur tí at verða skrivað Fámjin, slær nevndin fast*

## Nýggj føroysk bygdanøvn

**Nevndin kemur við fylgjandi tilmælum:**
**Akrar verður broytt til Agrar**
**Áir - Við Áir**
**Ánir - Ánirnar**
**Famjin - Fámjin**
**Haldarsvík - Haldórsvík**
**Hellur - Hellurnar**
**Kolbanargjógv - Kolbeinagjógv**
**Lambi - Lamba**
**Norðskáli - Norðskála**
**Skálabotnur/Skálafjørður - Í Skálafirði**
**Skáli - Skála**
**Øravík - Ørðavík**
**Øravíkarlíð ” Ørðavíkarlíð**

## ÁLIT viðvíkjandi navnaformum á vegskeltum hjá Landsverki

Í februar 2007 setti stjórin á Landsverki í samráð við rektaran á Fróðskaparsetrinum eina 5-mannanevnd at endurskoða bygdarnøvnini og møguliga onkur onnur nøvn, ið standa á kunningarskeltum hjá Landsverki á landsvegunum kring landið. Í nevndina vórðu vald Finnleif Durhuus sum umboð fyri Landsverk, Jógvan í Lon Jacobsen, Kristin Magnussen og Eivind Weyhe sum umboð fyri málfrøðina á Fróðskaparsetrinum og Ólavur Clementsen sum umboð fyri almenningin. Eivind Weyhe varð tilnevndur formaður. Arbeiðssetningurin skuldi vera at kanna málsliga grundarlagið undir verandi skipan, um hon er nóg góð ella skal broytast. Nevndin hevur havt einar seks fundir, har nøvnini hava verið gjøgnumgingin og viðgjørd. Av tilfari, sum nevndin fekk útflýggjað á fyrsta fundinum, kann nevnast føroyakort í kortmátinum 1:100 000, myndir av vegskeltum úr øllum landinum og skriv frá persónum og lokalum myndugleikum við ynskjum um broytingar.

## ... Tí broyta bygdirnar navn

### Lamba

Á skeltum og kortum stendur Lambi, men henda form hevur bygdarnavnið ongantíð havt. Upprunin til navnið er Lambhagi. Nevndin metir at endingin –a er ein viknað leivd av seinra liðinum –hagi, sbr. at –bø(ur) í Sunnbøur er viknað til –ba (Sumba) og –høvn í Vestmannahøvn er viknað til –a (Vestmanna). Formurin Lambi er at meta sum ein konstrueraður hvørfalsformur (í sambandi við útgávuna av Taxatiónsprotokollini í 1873), ið aldrin hevur verið sagdur. Lamba hevur verið sagt eisini í hvørfalli.

### Norðskála



Bygdin hevur einaferð í tíðini itið Norður við Skála, sum seinri er blivið til Við Norðskála (við umflyting av navnapørtunum). Ofta verður navnið tó brúkt uttan fyriseting, t.e. bara: Norðskála, og hesin formurin hevur fest seg sum navn á bygdini og er tí eisini at fata sum hvørfalsformur.

### Skála

Bygdin hevur upprunaliga itið At Skála, sum merkir ’bygdin við skálan’, og sum síðan er blivið til Á Skála. Skáli er at meta sum ein konstrueraður hvørfalsformur, sum ongantíð hevur fest seg í livandi máli sum navn á bygdini. Tað rætta bygdarnavnið er tí Á Skála. Tað verður tó ofta brúkt uttan fyriseting, t.e. bara: Skála. Hesin formur hevur fest seg sum navn á bygdini, t.d. ber til at siga: ”Skála er vøkur bygd”, og tá verður Skála brúkt í hvørfalli.

### Í Skálafirði

Bygdin hevur verið nevnd Skálabotnur á kortum. Í tí góðkenda staðanavnalistanum frá 1960 (hjá Stednavneudvalget) varð hetta broytt til Skálafjørður. Vansin við hesum navni er at tað eisini er navn á fjørðinum, og at tað við fjørðin eru fleiri aðrar bygdir. Fólk á staðnum vilja hava at munur er á navninum á fjørðinum og á búsetingini inni á botni við fjørðin. Vanliga siga tey Inni í Firði. Nevndin heldur tað vera eina góða loysn at brúka fyriseting í hesum føri og nevna bygdina Í Skálafirði.

### Ørðavík



Upprunin til navnið er óivað Hørðavík (eftir fólki av Hørðalandi í Noregi), men h fremst í navninum er fallið burtur tíðliga. Í Hundabrævinum frá 1350-1400 eitur bygdin Ørðavík, og soleiðis hevur hon eisini verið skrivað, líka til ð varð strikað á kortinum í 1943. At tað varð gjørt, komst av at Dr. Jakobsen nakað frammanundan hevði sett fram ta tolking, at bygdin hevði navn eftir eini á sum skuldi hava itið Ør (tí hon rann so ørliga). Henda tolking er síðan afturvíst, og tí verður mælt til at venda aftur til tann eldra og rætta formin Ørðavík.

### Ørðavíkarlíð, sí Ørðavík.